# TÍÐINDI

SAMBAND
KÁRI MIKKELSEN
KARIM@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Teitur á Islands Brygge fríggjakvøldið

**Fríggjakvøldið er tiltak í mentanarhúsinum Kulturhuset Islands Brygge í Keypmannahavn, har Teitur Lassen er høvuðsnavn**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Teitur er høvusnavnið og einasti solistur fríggjakvøldið í Kulturhuset Islands Brygge, sum eisini húsar tveimum góðum tónlekarum. At Teitur er eitt gott navn í Danmark í hesum døgum, er ikki ringt at skilja, i maðurin varð mettur at vera ársins danski sangari í fjør av Dansk Musik Awards, og boðin at lata upp Roskildefestivalin á størsta pallinum fyrr í ár. Hann hevur eitt ótal av útseldun konsertum á baki og hevur útgivið nógvar fløgur. "The Singer" fekk toppkarakter frá tónleikablaðnum Gaffa, sum skrivaði soleiðis: "et sjældent ambitiøst og i dansk sammenhæng helt unikt popalbum". Berlingske Tidende skrivaði: "Stemmen er i centrum på Teiturs hidtil stærkeste udspil, der ikke bare er vidunderligt smukt, men også sender færingen i en ny kunstnerisk retning… Med »The Singer« har Teitur begået sit stærkeste album til dato".

Umframt tveir góðar troubadourar friggjakvøldið, so kann Teitur hesaferð upplivast sum nakað annað - nemiga sum solistur komandi fríggjakvøld í Kulturhúsinum á Islands Brygge nr. 18 í Keypmannahavn. Kanska veður tað ein meira persónlig konsert frá Teiti, sum skal standa einsamallur á palli. Hinir báðir, sum upptraðka hvør sær, og onkuntíð saman, eru Sean Needham og Jacob Speake, og eru teir báðir væl royndir tónleikarar og hava fólk afturat sær á pallinum. Sean hevur hitað upp fyri t.d. Tracy Chapman og Jacob er fyriskipari av sjálvum tiltakinum fríggjakvøldið saman við Kuturhúsinum.

Á myspace hjá Teiti stendur at lesa, at umframt fríggjakvøldið, so hevur Teitur 10 aðrar konsertir næstu 14 dagarnar í Danmark, áðrenn hann fer víða um í Europa á túri, sum endar í Svøríki og Noreg.

Konsertin fríggakvødlið byrjar kl 20 endar um midnáttarleitið. Meira at um hetta á www.k-i-b.dk, upplýsir FO INVASION


*Teitur og hansara menn í Gotlandi*
*Mynd: Martin Dam Kristensen*

# Orkesturdagar hjá Musikkskúlanum í Trongisvági

**Í vikuskiftinum 26. til 28. eru næmingar úr øllum musikkskúlum kring landið bodnir at luttaka á orkesturstevnu í Suðuroy**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Higartil eru uml. 160 teknaði, og saman við 20 lærarum fara tey at framleiða tónleik, sum verður at hoyra á almennari konsert sunnudagin kl 15.00 í Høllini í Trongisvági.

Ein stórur foreldrabólkur stendur fyri øllum tí praktiska rundanum tiltakið, so sum matgerð og innivist, og uttan hetta kunnu slíkir dagar neyvan gjøgnumførast.

Líknandi átøk hava verið fyrr, og í fjør var sama harkalið saman á Eiði, og nú gleða øll seg, tí tað var sera væleyndnað og hugnaligt, ikki minst tann festliga konsertin sum var prikkurin yvir i'num, siga fyrireikararnir.

Konsertin verður í rúmligu høllini í Trongisvági til konsert sunnudagin kl. 15.00

Atgongd: kr. 50,- børn ókeypis

**www.listagluggin.com**

**Vit sóknast eftir** verkum eftir Mykines, Reyni, Heinesen, Ruth Smith, Kamban, Glerfoss, Kampmann, Kruse, Waagstein og øðrum dygdargóðum listafólkum í samband við komandi søluframsýning.

**Frættið nærri við at seta tykkum í samband við okkum.**


Ingálvur av Reyni, 1993 - Trolaradekk, 130 x 215 cm

ART Listagluggin GALLERIE

Niels Finsensgøta 25 · Tórshavn
Tlf. 322022 · Mob. 210022
e-mail: listagluggin@hotmail.com

týsdag - fríggjadag:.......15.00 - 17.30
leygardag:......................11.00 - 14.00
Annars eftir nærri avtalu !